## TILTØK

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Mike Fitzgerald talar, kl. 18 kvøldmøti Per Eivind Stig talar.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Rhema á Hálsi**
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P.
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið Húsagøta 1**
Missiónsvikan í Meinigheitshúsinum, Húsagøta 1. Í kvøld kl. 20 møti, talari: Niels Jacob Nielsen, sangur: Manskórið í Meinigheitshúsinum. Innsavnan til Heimamissiónsarbeiðið. Leygarkvøldið kl. 20 møti, talari: Niels Jacob Nielsen, sangur: Petur Hans Hansen og Tummas Dam. Innsavnan til Ytrimissiónsarbeiðið. Barnaansing er meðan møti er. Bønarløta er hvørt kvøld ein tíma áðrenn møti byrjar. Bókaborð og drekka verður aftaná møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Jóan Peter Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Jóna og Miu Johannesen, á Frælsinum 24. Øll eru vælkomin.

**»Tíð til Gud«**
verður í Pállstovu í Havn sunnukvøldið kl. 21. Hesuferð verður friður vitnisburður. Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30: Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti har børnini eisini taka lut.
Mánakvøldið kl. 20.30 Ungu hjúnini savnast hjá Monu og Sverra, Fjalsgøta 7.

**Saron, Vestmanna**
Fríggjadagin kl. 20.30 bønarmøti. Sunnudagin kl. 18 evangel. møti.
Mánadagin kl. 20.30 bønarmøti.

**Konfirmatión**
í eystara parti av Norðstreymoyar prestagjaldi verður í Hvalvíkar kirkju pálmasunnudag 08. apríl kl. 11. Farið verður at ganga til í Hvalvíkar missiónshúsi týsmorgunin 27. mars kl. 08. Í hesum sambandi eru bæði komandi konfirmantar sum foreldur/avvarðandi teirra vælkomin til ein drekkamunn í Hvalvíkar missiónshúsi týskvøldið 06. febrar kl. 20.30.

**Filadelfia, Sundalagi**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 í Kelduni v/ Pola Jacobsen.

**Lívsins Orð**
Leygardagin kl. 17.30 barnamøti og kl. 20.30 opið hús. Sunnudagin kl. 10.30 møti við Dávid Bech og kl. 19 Evangeliskt møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Paula Høj. Sunnudagin kl. 17 møti við Malmberg Olsen. Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Ørkin, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við David Bech.
Húsmøti verður hjá Jonnu og Palla Højgård týsdagin kl. 19. Verið øll hjartaliga vælkomin.

**Bíbliuskeiðrøðin**
yvir evni hin sanni lærisveinurin verður hildin í hølum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn mánadag kl. 19. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður í missiónshúsinum á Tvøroyri fríggjakvøldið 2. februar kl. 21.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Johan Thomasen.
Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Fundarøðin hjá Svenning av Lofti heldur fram í kvøld kl. 20.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Magnus Jensen.
Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagur 29.1.*
kl. 10-18 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan og túrin mikudagin á tlf. 316491
*Týsdagur 30.1.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hvør kennir? Gamlar myndir frá myndasavninum í Hoyvík
*Mikudagur 31.1.*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 14 Møguleiki er at læra seg sjavs
kl. 14.30 Úr sjón og úr minni. Framsýning av bókum og handritum Chr. Matras 100 ár
*Hósdagur 1.2.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát um skanning, brenning, printing og nýtslu av alnótini verður á 1. hædd. Brandur Petersen
*Fríggjadagur 2.2.*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Blái Krossur**
bjóðar til eftirviðgerð hvørt mánakvøld á skrivstovuni á Bláa Krossi á Glyvrum, kl. 20-21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

**Javni N. Finsensgøta 32**
Skrivstovan er stongd vegna flyting. Samband fæst við felagið við at ringja tlf. 314827 og 224589, fax: 310557.
e-mail: javni@post.olivant.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail: gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Telefonviðtala týsdag frá kl. 10-12.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum: Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106 eftir skúlatíð.
E-mail: sara@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík**
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Evangeliska Røddin**
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

**Føroyskt møti í Ålborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Heimamissiónin**
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

**Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.



## FILMSTEIGURIN

# Vertical limit

Man situr úti á kantinum á setrinum, tá man sær kensluborna action/ævintýrfilmin, Vertical Limit. Filmurin er spennandi søgan um tann unga klintraran, Peter Garrett (Chris O'Donnell), sum má út á eina vandamikla bjargingarferð á K2, heimsins næsthægsta fjallatindi. Hann má útfordra bæði sínar egnu avmarkingar og náttúrunnar ótrúligu og óstýriligu megi í roynduum at bjarga systur síni, Annie (Robin Tunney) og klintriliðnum (Bill Paxton og Nicholas Lea), og tað er ein kampur móti urinum.

Ár frammanundan mistu Annie og Peter pápan í eini tragiskari klatriólukku. Petur tók eina kvika avgerð og skar pápan frían fyri at bjarga systur síni og seg sjálvan. Eftir ólukkuna isoleraði Petur seg sum náttúrufotograf, og Annie forfylgdi dreymi pápans um at klintra upp á heimsins hægsta fjall.

Nú situr hon fangað í eini ísgrøv í 8000 metra hædd, har man ikki kann yvirliva rættuliga leingi. Hvørt sekund telur, og Petur setur saman bjargingarliðið við klintrarum, harímillum tann eksentriska, reserveraða Montgomery Wick (Scott Glenn), sum fer á vandamiklu bjargingarferðina.

»Vertical Limit« er ein rættur actionfilmur, bygdur á dirvi og avgerðarvilja, sum kulminerar í einum harðum kampi fyri at yvirliva – drivin av familjubondum, sorg og skuldarkenslu.

Men á heimsins takið er andadráttur ein fryst tráan eftir luft, og hvørt fet tekur ævigheitir…





# Hjálp eg eri ein fiskur

Ein miseydnaður fiskitúrur fær tey trý børnini, Svip, Stella og Plum at villast. Tey enda í misteinkiliga laboratioriinum hjá Mac Krell, professara. Professarin arbeiðir upp á ein eliksir, sum skal gera tað møguligt fyri menniskju at liva undir vatni, tá hann roknar við, at heimurin fer at enda undir í vatni.

Lítlasysturin hjá Svip, Stella, drekkur av óvart eliksirin og broytist til eina sjóstjørnu og enda á havsins botni. Hini verða nú noydd at fyljga henni. Svip sum ein fiskur og Plum sum ein vatnmaður. Tey skulu ikki brúka fleiri enn 48 tímar til at fina systur Svip og mótgiftið – annars verða tey verandi fiskar.

Tey trý fiskabørnini uppliva nú eina røð av stuttligum og spennandi ævintýrum, og Stella finnur ein sannan hjartavin í sjóhestinum, Sasha.

Søgan broytist brádliga, tá tannreinsarafiskurin, Joe, fær finnurnar í fløskuna við mótgiftunum. Mótgiftin gevur finskum menniskjansligt gløgni, og Joe finnur nú út av, at hann við hjálp av sínum nývunnu talugávum kann broytast frá at vera síðsta liðið í føðiketuni til at verða einaherskari undir vatninum. Gamli »arbeiðsgevarin« hjá Joe, ein stórur, ljótur hávur, verður nýggi hjálpari hansara, sum skjótt fær fylgju av einum heilum heri av ljóðligum undirsáttum.

Svip og Plum skulu vinna á mongum forðingum, áðrenn tey finna aga og vinskap, og bert við góðum klókskapi og dirvi, hava tey nakran møguleika fyri at fella Joe og hansara harðrenda stýri…





**Frumsýning**

Fríggjadagin 02.02. kl. 21$^{00}$ Fríggjadagin 02.02. kl. 23$^{30}$
Leygardagin 03.02. kl. 21$^{00}$ Leygardagin 03.02. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 04.02. kl. 20$^{00}$ Sunnudagin 04.02. kl. 22$^{30}$

**www.in.fo/havnarbio**

**HAVNAR BIO**
☆ Tlf. 311956 ☆




**Frumsýning**

Fríggjadagin 02.02. kl. 18$^{00}$ Leygardagin 03.02. kl. 18$^{00}$
Sunnudagin 04.02. kl. 18$^{00}$




Fríggjadagin 02.02. kl. 20$^{00}$ Leygardagin 03.02. kl. 22$^{30}$
Sunnudagin 04.02. kl. 22$^{00}$




Fríggjadagin 02.02. kl. 23$^{00}$ Leygardagin 03.02. kl. 20$^{00}$
Sunnudagin 04.02. kl. 19$^{00}$

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning Fríggjadagin 09.02.**




**Frumsýning Fríggjadagin 09.02.**